## Døma EM-undankapping

Um knappan mánað skulu Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen til Íslands at døma í bólki 8 í EM-undankappingini fyri U18-landslið. Ísland, Finnland, Turkaland og Letland eru í undankappingarbólki 8, sum verður spældur í Íslandi í døgunum 9. til 11. mai. Tveir dystir eru hvønn dagin, og tvey altjóða dómarapør skulu døma hesar. Annað av pørunum er altso føroyska altjóða parið, sum við hesum fær tríggjar altjóða dystir at døma.



## Chelsea snávaði

Chelsea fekk bert javnleik 1-1 á Stamford Bridge ímóti Wigan, hóast teir høvdu nóg mikið av málmøguleikum at avgera dystin. Michael Essien legði Chelsea á odda í 55. minutti, men væl inni í yvirtíðini javnaði gamli Liverpool-leikarin, Emile Heskey fyri Wigan. Hjá Chelsea kom tað sera illa við at missa 2 stig, tað merkir, at teir eru 5 stig aftanfyri Manchester United, sum er á odda í Premier League. Bert 4 umfør resta, men allar súðir eru ikki syftar enn. Vinnur Chelsea ímóti Everton hóskvøldið, og snávar Manchester United ímóti Blackburn er alt við opið aftur, áðrenn liðini hittast á Stamford Bridge. Fyri Wigan hevði javnleikurin alstóran týdning. Teir hava vunnið seg uppá 35 stig, og eru teir 6 stig omanfyri niðurflytingarstrikuna.




*Málið á Eiði, sum gjørdi HB til meistara, fekk ilt í nógvar klaksvíkingar. Og í øllum førum var Clapson tann dagin mest elskaði klaksvíkingurin í Havn*

# Trupult uttan Tony Paris

**- Tað gjørdi eisini avgerðina lættari, at Tony Paris ikki longur er venjari í KÍ. Eg kom við honum til Føroya, og tað var eitt sindur trupult, tá hann ikki var í umhvørvinum, sigur Paul Clapson, sum longu hevur gjørt vart við seg í íslendskum fótbólti**

FÓTBÓLTUR

*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Dagurin er 21. oktober, 2007. Í einum týdningaleysum dysti á næst seinasta leikdegi í Formuladeildini vitja klaksvíkingar í Gundadali, har HB tekur ímóti. Við máli av Símuni Joensen eru gestirnir úr Klaksvík á sigurskós, nú seinni hálvleikur er hálvrunnin. Rókur av Fløtum Jespersen hevur bóltin á egnari hálvu og setir ferð á. Í eini roynd at steðga vandamikla skjóálopinum tveitir Paul Clapson seg í glíðandi takkling, og Jespersen fer um koll. Páll Augustinussen, dómari, ivast ikki. Reytt kort og farvæl. Fyri einum árum síðan var hann mest elskaði »klaksvíkingur« í Gundadali, men nú rópa og geyla fjepparnir hjá HB eftir honum. Eitt farvæl til ein av størstu persónligheitunum í føroyskum fótbólti seinnu árini.

Søgan um Paul Clapson er øðrvísi enn tær flestu í fótbóltsheiminum. Málmaðurin, sum gjørdist málrevur í føroyskum fótbólti, takkaði um ársskiftið fyri seg í Klaksvík, og í leiklutinum sum framherji hevur hann longu skotið seg í hjørtuni á fjepparaskarðanum hjá Afturelding, sum spælir í næst bestu deildini í Íslandi. Stóri og vælbygdi onglendingurin við tiltikna hárinum fekk ongantíð sagt veruligt farvæl við klaksvíkingar, tá hann var útvístur í dystinum móti HB.

### Eks-daman í Føroyum

Tað var upprunaliga sum málverji, at Paul Clapson kom til Føroya í 2006. Tony Paris hevði undankappingar-